# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# GEVIÐ OKKUM FÓLKAATKVØÐU

Sum vit síggja í blaðnum í dag, so hevur spurningurin um eina fólkaatkvøðu um sambandið millum Føroyar og Danmark verið umrødd á landsfundi hjá Javnaðarflokkinum. Har var ført fram, at vit eiga at fáa eina fólkaatkvøðu, sum einaferð med alla kann greiða viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum. Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, tekur undir við tankanum, sum vit óivað fara at frætta meira um.

Tað gongur sjón fyri søgn, at føroyskir politikarar ganga og vevja í tí sama alla tíðina. Hóast ríkisrættarliga støðan er nógv broytt farnu 100 árini, so fyllir málið ov nógv - serliga tí, at tveir flokkar hava hetta eina málið sum fremsta stevnumið. Tó tykist, at aktuella málið um stjórnarskipanaruppskotið er tað frægasta, sum semja kann fáast um, so her er kanska loysnin, sum kann gera upp við yvir 100 ára gamla stríðsmálið, sum hevur sett so nógvar kílar í føroyskan partapolitikk.

Tað eru nú meira enn 10 ár síðani, at Fólkaflokkurin avlýsti fólkaatkvøðuna um fullveldi, sum skuldi vera 26. mai í 2000 – og seinni kollsigldi fullveldisætlanin hjá Tjóðveldinum, sum harvið er parkerað.

Men vit eiga at koma víðari, og tí hevði ein fólkaatkvøða heilt vist verið áhugaverd – ein fólkaatkvøða, sum kundi greitt ríkisrættarliga politikkin - og sum kundi fingið flokkar at samstarvað, sum ikki hava kunnað tað, tí stjórnarskipanarmálið hevur fylt alt ov nógv.

Um so er, at fólkið ynskir, at skilnaður skal verða millum Føroyar og Danmark, so er at gera tað. Og um so, at fólkið ynskir at varðveita ríkisfelagsskapin - ella at »innlima okkum í ríkisfelagsskapin«, sum loysingarfólk plaga at siga, so gera vit tað – ella fólkið ynskir eina loysn harímillum, so gera vit tað.

Tí tað kann bara gagna føroyska samfelagnum, um vit koma víðari – og fáa valt fólk á ting – úr øllum flokkum – sum veruliga ynskja at skapa okkum eitt betri samfelag.



Politikararnir skylda okkum at greiða hetta yvir 100 ára gamla stríðið. Og tað má gerast við eini millumloysn, tí fólkið vil ikki hava fullveldi, og fólkið vil ikki aftur í amtstíðina. Tí má loysnin vera ein millumloysn, og hon skal finnast.

Eitt eiga vit øll at minnast til, at politikarar eru fólksins tænarar – ikki øvugt!

**Ein fólkaatkvøða kundi gjørt, at vit komu víðari**

# Lætt at falla í pamparagrøvina



Tað er fallið Bjørt Samuelsen og Sjúrði Skaale, tjóðveldistingfólkum, fyri bróstið, at Rás2 og Portalurin hava borið tíðindini um, at tey bæði vóru í New York, har tey millum annað runnu marathon, uttan at biða um farloyvi frá løgtingsarbeiðinum, so næstu fólk teirra kundu møta.

Tey rógva framundir, at tey ikki bara hava runnið, men kanska eisini skrivað okkurt álit, meðan tey vóru í New York. Og so fáa vit ta tiltiknu umberingina, sum politikarar, ið møta illa upp í tinginum vanliga koma við, at »politiska arbeiðið er so ógvuliga nógv annað, enn at sita á tingfundi«.

Nú er Sjúrður Skaale tikin úr leikum sum skemtari. Tí var tað so upplagt, at hann kom á hesa síðuna undir oddagreinini hendan dagin. Fáur hevur sum hann átalað politikarar, sum ikki gera sítt arbeiði til lýtar, eitt nú tí teir røkja fleiri størv. Og hendan dagin vóru hann og Bjørt speirikin av sínum egna floksfelaga – havnarfútanum(!!) og løgtingsmanninum Tórbjørn Jacobsen – av tingsins røðarapalli!

Men tað var júst av hesum positiva vilja til poltiskt arbeiði, sum Sjúrður Skaale so mangan hevur víst á, at vit høvdu væntað okkum annað, enn at hann »clearaði« sær frí og »læt eitt undirskrivað bræv liggja eftir seg, um neyðugt...«. Halló Sjúrður, heldur tú, at ein skúlalærari hevði kunnað farið til New York við fullari løn og sagt, at hann skuldi hava løn, tí hann rættaði nakrar stílar?

Ein klókur maður úti á Argjum segði so seint sum í gjár, at politikarar gloyma so skjótt, at fólkið er teirra arbeiðsgevari - tað eiga tey bæði eisini at leggja sær í geyma.

Skuldi Sjúrður hildið sítt image og ikki fallið so skjótt í pamparagørvina, so sendi hann boð eftir Páll á Reynatúgvu at røkja tingarbeiðið hesar dagarnar – eins og hann hevur gjørt áður, tá hann til dømis hevur spælt kommediu saman við Jákup Weyhe.

Men bara rólig, tit bæði. Eins og áður, so fara vit at almannakunngera uppmøtingina hjá øllum ting- og landsstýrisfólkum, tá árið er liðið!


**Sjurdur Skaale** Fer ein túr á rennibreytina. (Fyri fulla løn!)
Mánadagur kl. 22.23 · Dáma · Viðmerk

Sjúrður Skaale á Facebook



**Marathon í Vágsbotni**

SJÚRÐUR SKAALE OG BJØRT SAMUELSEN KJAK Á SÍÐU 14



**Politisk útpurring**

EYÐUN JOENSE KJAK Á SÍÐU 33

# Tók Miðlahúsið fram um Dimmu

Í táttinum hjá Kringvarpinum, har tey spyrja blaðstjóra á Dimmalætting um ymiskt, var evnið í tíðindasendingini í gjárkvøldið landsdysturin millum Skotland og Føroyar. Spurningurin til Árna Gregersen var, hvussu uppstillingin hjá føroyska landsliðnum ímóti Skotlandi fór at vera.

Men tað sum er stuttligt fyri okkum var, at hann tók Sosialin fram um Dimmalætting, tá hann segði, at vert var at leggja merki til, at ársins spælari í Føroyum, Fróði Benjaminsen, var ikki við hesaferð.



Bæði bløðini hava kosið ársins spælara í Føroyum. Miðlahúsið hevur havt eina atkvøðugreiðslu, har Fróði Benjaminsen varð vinnarin. Dimmalætting hevur havt eina sms-atkvøðugreiðslu, har Arnbjørn Hansen varð valdur til ársins spælara. Vit leggja til merkis, at blaðstjórin á Dimmalætting tekur atkvøðugreiðsluna hjá Miðlahúsinum fram um sína egnu atkvøðugreiðslu – og vit fegnast um góða samstarvsandan frá kappingarneytanum!

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*